

## Jóannes skal venja ÍF Føroyar

Í næstum fer ÍF Føroyar undir venjingina aftur, og 1. lið hjá felagnum hevur fingið nýggjan venjara. Julian Hansen er givin, og í hansara stað er komin Jóannes Jacobsen, skrivar heimasíðan hjá ÍF Føroyum. Jóannes er 33 ára gamal og skrivar í løtuni PhD-ritgerð á lærda háskúlanum í Keypmannahavn. Jóannes spældi við HB øll ungdómsárini.

Venjarar hjá 2. og 3. liði verða Birgar Larsen og Jón Henriksen, men felagið manglar framvegis venjara til kvinnuliðið.

## Johansson roknar við at verða valdur

Tvey uppskot eru til forseta í UEFA á valinum, sum verður í næstu viku. Annar er forsetin nógvu seinastu árini, Lennart Johansson úr Svøríki, og hitt er avbjóðarin Michel Platini úr Fraklandi.

Teir báðir eru nú farnir undir endaspurtin í valstríðnum, har tey 52 limalondini skulu gera av, hvør av teimum verður valdur. 77 ára gamli Johansson roknar við, at hann verður afturvaldur til næstu fýra árini.

- Atkvøðugreiðslan er loynilig, og tað merkir, at fólk kunnu atkvøða júst, sum teimum lystir, og tað gera tað trupult at rokna valið út. Men fara formenninir í teimum ymsu fótbóltssambondunum at atkvøða, sum teir siga, so eri eg vísur í, at eg vinni valið, sigur Lennart Johansson.

# Fyrstu steypavinnararnir í ár funnir

**Fimleikahøllin á Glyvrum var karmur um steypakapping í amboðsfimleiki leygardagin, sum Føroya Fimleikasamband og Støkk skipaðu fyri.**

FIMLEIKUR

*Lív Reinert Kjeld*
*liv.reinert.kjeld@sosialurin.fo*

Fitt av fólkið var og hugdi eftur steypakappingini í amboðsfimleiki, sum var í fimleikahøllini á Glyvrum leygardagin. Tað var Fimleikafelagið Støkk, sum saman við Føroya Fimleikasambandi skipaði fyri hesu fyrstu steypakappingini í amboðsfimleiki, sum er tann fyrsta av trimum kappingum í ár. Tvær tær næstu kappingarnar vera báðar í februar, og tá vera tað Havnar Fimleikafelag og Ljósið, sum skipa fyri hvør sínari steypakapping í Havn.

Fimleikararnir eru sera fegnir um, at teir hava fingið henda møguleika afturat at kappast, tí at nógv tíð og orka verður nýtt í fimleikahallunum kring landið til venjingar og fyrireikingar, og tá ið fleiri kappingar eru um árið, er lættari at halda motivatiónini uppi. At kappast verður í einstøku amboðunum fyri seg hevur eisini við sær, at fimleikararnir veruliga fáa høvi at vísa síni kynstur í teimum greinum, sum teir eru stinnastir í.

Tilsamans vóru umleið 25 fimleikarar, sum kappaðust leygardagin. Fimleikararnir vóru frá Ljósinum, Støkk og Havnar Fimleikafelag. Farið var undir at skipa fyri tílíkum steypakappingum í fjør, og fyribils eru kappingarnar bert fyri tveir teir elstu aldursbólkarnar. Sostatt vóru fýra bólkar, sum kappaðust leygardagin; kvinnurnar og kvinnuunglingarnir kappaðust á bitanum, meðan menninir og mansunglingarnir kappaðust í ringunum.

Næsta steypakappingin í amboðsfimleiki verður sunnudagin 11. februar í høllini á Stórheyggi í Havn. Tá fáa fimleikararnir høvi at kappast í lopi um hest.



*Kristina Toftegaard frá Støkk vann kappingina hjá kvinnunum við einari sera flottari og sannførandi framførslu á bitanum.*

### ÚRSLITINI

**Kvinnur:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Kristina Toftegaard, Støkk | 11,40 stig |
| 2 | Birita Dal-Christiansen, HF | 10,65 stig |
| 3 | Brim H. Hoydal, Ljósið | 10,40 stig |
| 4 | Sonja Joensen, Støkk | 10,35 stig |
| 5 | Anita Knudsen, Støkk | 9,55 stig |
| 6 | Vár Poulsen, HF | 9,35 stig |
| 7 | Elinborg T. Durhuus, Ljósið | 9,25 stig |
| 8 | Martha Nolsøe Hansen, HF | 9,20 stig |
| 9 | Monika Poulsen, Støkk | 9,15 stig |
| 10 | Silja Højgaard, Støkk | 9,05 stig |
| 11 | Anna H. Joensen, Støkk | 8,75 stig |
| 12 | Marjun Danielsen, HF | 7,75 stig |

**Kvinnuunglingar:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Natasha Olsen, Ljósið | 7,75 stig |
| 2 | Eyðna Danielsen, HF | 6,85 stig |
| 3 | Birita Poulsen, HF | 6,80 stig |
| 4 | Beinta Joensen, HF | 6,60 stig |
| 5 | Herdis Thomsen, HF | 6,30 stig |

**Menn:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Fróði Mortensen, HF | 11,10 stig |
| 2 | Eyvind A. Hansen, HF | 11,00 stig |
| 3 | Rósing Dam, HF | 10,30 stig |
| 4 | Høgni R. Øster, HF | 10,10 stig |
| 5 | Kristian í Lon Olsen, Støkk | 9,50 stig |
| 6 | Jóni B. Christiansen, HF | 9,40 stig |

**Mansunglingar:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Kári Carlsen, Støkk | 10,45 stig |
| 2 | Olivur Debes Eiriksfoss, HF | 10,00 stig |

HM-Hondbóltur:

# Svingandi byrjan hjá Norðanlondunum

**Danmark og Noreg fara í kvøld at kappast um síðsta plássið til millumspælið, tá tey møtast í innanhýsis dysti í bólki E. Hjá Íslandi sær heldur ikki gott út. Teir skulu vinna á Fraklandi fyri at koma víðari**

HONDBÓLTUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Nógv var væntað av teimum trimum norðanlondunum undan HM-kappingini í hondbólti. Danmark varundan kappingini mett millum størstu favorittarnar at røkka hálvfinalunum, meðan bæði Ísland og Noreg vóru mett at kunnu røkka heilt langt. Byrjanin hjá teimum trimum londunum hevur tó ikki verið heilt eftir vild.

**Ísland á veg heim**

Ísland var endað í bólki B, har teir skuldu møta Fraklandi, Ukreina og Avstralia. Mett var, at kappingin um annað plássið fór at standa ímillum Ísland og Ukreina, tí at Frakland var undan kappingini mett at vera millum størstu favorittarnar at vinna HM-heitið.

Nú er tó líkt til, at Ísland má vinna stórsigur á Fraklandi í síðsta innleiðandi dystinum, fyri at hava nakran møguleika at tryggja sær víðari luttøku til millumspælið. Grannarnir fyri norðan fingu eina góða byrjan, tá teir vunnu stórsigur á Avstralia, men í næsta dystinum taptu teir fyri Ukreina. Tí eru teir endaðir í teirri keðiligu støðu, at ein stórsigur er kravið í síðsta dystinum, tá teir møta sterku fransunum.

**Kapping millum Danmark og Noreg**

Í bólki E vóru hini bæði Norðanlondini, Danmark og Noreg, endað í bólki saman. Hini bæði liðini vóru Ungarn og Angola, og undan kappingini vóru Danmark og Noreg mett sum sterkastu liðini í bólkinum.

Eftir fyrstu tveir dystirnar er tó greitt, at Ungarn hevur tryggjað sær sigurin í bólkinum við sigrum á bæði Danmark og Noreg. Í síðsta dystinum møta ungararnir Angola, og her verður roknað við, at Ungarn fer at vinna stórsigur.

Tað vil siga, at tey bæði grannalondini, Danmark og Noreg, skulu kappast um síðsta plássið í millumspælinum. Dysturin millum tey bæði liðini verður á skránni í kvøld, og vinnarin av dystinum tryggjar sær víðari luttøku til millumspælið. Endar dysturin við javnleiki, so verður tað Noreg, sum kemur víðari.